## Landar í Norra



Ruth hevur gjørt enn ein góðan túr. Í dag liggja teir í Norra og landa 600 tons av makreli. Ruth hevur annars landað nógv í Týsklandi.

## Duga ikki at undirvísa dansi og kvæðamentan

Fólkaskúlalærarar duga ikki at undirvísa í dansi og kvæðamentan okkara, staðfestir skrivarin í Lærarafelagnum, Jónleif Johannesen. - Tað er við tungum sinni og ringum huga, at lærarar loysa hesa uppgávu, og føroyski dansurin er tí ein sonn plága fyri flestu lærarar, heldur hann sambært uf.fo. Føroyski dansurin kom inn um fólkaskúlagátt fyri tíggju árum síðani, men síðani er stevið versnað: - Summastaðni er støðan so ring, at spurningurin er, um ikki tað var betri, at eingin dansur var yvirhøvur, sigur Jónleif Johannesen, sum heldur, at neyðugt er at staðfesta trupulleikarnar og síðani gera ábøtur, um dansurin skal fáast á rættkjøl aftur. Hann heldur, at lesiætlanirnar eru í lagi, tí tær eru tillagaðar eftir førimuni. Men tað er ein stórur mangul upp á námsfrøði innan økið, og tí má Skúlabókagrunnurin til verka. - Vit eiga at leggja okkum eftir at klæða kvæðatilfarið í ein námsfrøðiligan búna, so at allir lærarar megna eina nøktandi kvæðaundirvísing, sigur Jónleif Johannesen.



*Blámusoppur varð staðfestur í einum kjallararúmi á hesum húsunum, ið vanliga verða nýtt til barnagarð. Mánadagin verða tó eingi børn í barnagarðinum, og stóri spurningurin er hvar tey so skulu vera*

# Óvissan valdar til mánadagin

**Síðan blámusoppur varð staðfestur í Barnagarðurin á Teigum á Sandi, hava børnini verið ansað í Dagrøkt. Arbeitt verður við at fáa fyribilshøli til mánadagin, men til tað er komið á pláss, valdar óvissa hjá foreldrum og starvsfólkum**

BLÁMUSOPPUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Mikudagin fekk Barnagarðurin á Teigum á Sandi svar frá fyritøkuni HMP Consultum, at blámusoppur var staðfestur í einum rúmi í kjallaranum.

Henda kanningin varð umbiðin eftir at starvsfólkini høvdu varnast ringan lukt, fuktmerki og sjúk børn, har foreldur høvdu gjørt vart við at børnini hava verið meira sjúk, tá tey hava verið í barnagarði, enn tá tey eru heima.

Blámusoppurin er staðfestur í einum kjallararrúmi, har barnavognar vanliga standa.

Sum støðan er nú kannar Arbeiðseftirlitið húsini, til tess at fáa staðfest hvussu umfatandi blámusoppurin er í húsunum.

Húsini, har barnagarðurin á Teigum húsast, eru eini eldri hús, ið eru keypt til barnagarðin og inrættað til barnagarðsbrúk.

### Framtíðin óviss

Síðan blámusoppurin varð endaliga staðfestur, hava eingi børn verið í barnagarðinum. Upprunaliga sá út til at tey noyddust inn í soppafongda barnagarðin aftur í gjár, men ein nýggj støða varð síðan tikin, har vøggustovubørnini hava verið í dagrøkt inntil hølistrupulleikarnir eru fyribils loystir.

Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri í Sands Kommunu, segði í gjár við Kringvarpið, at børnini eru í dagrøkt til hølistrupulleikarnir eru loystir, og at tað skuldu teir vónandi verða mánadagin.

Inntil tá er valdar óvissa hjá foreldrunum at teimum 52 børnunum í barnagarðinum á Teigum á Sandi, og hjá teimum 13 fólkunum, ið starvast har dagliga.

# Hátíðarhalda íslendska móðurmálið

**Íslendingafelagið Frón, felag Íslendinga og Íslandsvina í Føroyum, skipa sunnudagin fyri einum mentanartiltaki og hugnaløtu í Fútastovu, aðalkonsuláti Íslands**

FELAG
*Snorri Brend*

Ríkisstjórn Íslands avgjørdi heystið 1995, at 16. november hvørt ár, sum er føðingardagur Jónasar Hallgrímssonar, tjóðarskalds, skuldi verða vígdur íslendskum máli.

Á hvørjum ári síðan hevur tí verið skipað fyri tiltøkum hendan dagin til at hátíðarhalda móðurmálið.

Sunnudagin klokkan 16 verður eitt tiltak í Fútastovu, har hugleitt verður um skaldið Jónas og eisini Stein Steinarr, sum var føddur fyri 100 árum síðan.

Hesi bæði skaldini hava týðandi sess í íslendskari mentan og hava fleiri yrkingar teirra verið týddar til føroyskt. Felagið Frón bjóðar í hesum sambandi íslendingum og føroyingum at koma saman til eina hugnaløtu.

Skráin sunnudagin verður merkt av sangi, tónleiki og upplestri. Tey, sum fara at framføra, eru m.o.: Kórið Sólarmagn undir stjórn Fróða Sandoy, Kári P., Carl Johan Jensen og Johan Hendrik W. Poulsen. Eisini verður felagssangur á skránni.

Eftir tiltakið verður drekkamunnur, kaffi og pannukøkur, og høvi verður at práta og hyggja í bøkur, sum verða til keyps á serligum tilboði.

Tiltakið kostar 50 krónur.



*Serstakt tiltak í Fútastovu sunnudagin fyri føroyingum og íslendingum*